VERKAFÓLK

Tórshavn 7. Januar 2026

Viðmerkingar til lógarbroytingar í eftirlønarlógini (viðv. útgjald av eftirlønar áðrenn fólkapensjón)

Uppskotið er jaligt og feløgini í Verkafólk – Føroya Arbeiðarafelag, Føroya Fiskimannafelag, Havnar Arbeiðarafelag, Havnar Arbeiðskvinnufelag, Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag og Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag - taka undir við uppskotinum, men eftirlýsa somuleiðis eini skipan viðvíkjandi tíðartreytaðari pensjón at galda fyri verkafólk, sum á ungum árum eru farin á arbeiðsmarknaðin.

Feløgini í Verkafólk heita samstundis á landsstýrið um at geva hesum persónum - ið hava fingið atgongd til egna eftirløn áðrenn fólkapensjónsaldur - útgjald úr Samhaldsfasta. Til hetta krevst ein broyting í løgtingslóg nr. 39 frá 7. mei 1991 um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn (Samhaldsfasti). Mælt verður til at gera eina líknandi orðing í lógina um Samhaldsfasta, sum skotið er upp í hesari lógini.

Viðvíkjandi kostnaði, so er hesin avmarkaður av tí at talan er um ein avmarkaðan skara av fólki samstundis sum væntaði livialdurin hjá hesum bólkinum av fólki er væl styttri enn miðal. Vísast kann til livialdurskanningar í londum rundanum okkum síðani 1970'unum, ið vísindaliga staðfesta hetta. Í miðal liva fólk, ið eru ófaklærd ella hava styttri verkligar útbúgvingar 4-8 ár styttri enn fólk við longri útbúgvingum. Tá talan er um fyritíðarpensjónistar er hesin munur størri.

Vegna Verkafólk,

Sonja J. Jógvansdóttir, samskipari